gult cyan magenta svart



TB-ÍF 2-3 (22-25, 26-24, 25-15, 18-25, 10-15)

# ÍF vann á Tvøroyri

**Eftir eina gó›a byrjan er TB nú fullkomuliga ste›ga› upp, og um vikuskifti› máttu tær á heimavølli lúta fyri ÍF**

FLOGBÓLTUR, KVINNUR

Ta› vóru gla›ar fuglafjar›argentur, sum sunnukvøldi› komu aftur av Tvøroyri, har tær høvdu vunni› á TB fyri fyrstu fer› í longri tí›.

TB-li›i› var ikki fullmanna›, vi› ta› at Tóra Mortensen og Selma Danielsen ikki vóru tøkar til dystin, men eftir spælistyrkini higartil, skuldi hetta ikki havt ávirkan á endaliga úrsliti› á dystinum, og hev›i ein rokna› vi›, at hetta var ein avgrei›sluspurningur hjá TB.

Men ÍF vildi ta› ø›rvísi. Tær vunnu fyrsta setti› 25-22, og ta› næsta kundi koppa bá›ar vegir, og hetta enda›i ikki fyrr enn vi› stø›una 26-24, og sostatt var hetta eisini ta› mest spennandi setti› í dystinum. Og ta› var TB sum var omaná.

### TB tryggan sigur

Í tri›ja setti› fall spæli› hjá ÍF fullkomuliga saman, og TB kom rættuliga inn í dystin aftur. Tær vunnu hetta setti› heili 25-15. Vónir vóru nú um, at TB skuldi klára at halda tørn, men hetta vildu nor›ingarnir annarlei›is.

### Helen fremst

Vi› landsli›sleikaranum Helen á Lækjuni á odda vi› tryggum spæli á mi›juni, vendi ÍF aftur dystinum í 4. setti, og vunnu tær trygt 25-18.

Í ste›ginum ímillum 4. og 5. setti› hevur ÍF uttan iva lagt tann betra taktikkin, tí tær vunni hetta setti› trygt vi› settmuninum 15-10 og sostatt dystin 3-2 og harvi› sín annan sigur í ár. Men spæli› skal betra seg munandi, um tær skulu klára seg ímóti oddali›unum Drátti og Mjølni, men framgongdin er har.




*Unga TB li›i› hevur havt sera misjøvn úrslit hetta kappingarári›. Hesa fer› taptu tær fyri ÍF*

Fossanes-Dráttur 0-3 (13-25, 8-25, 9-25)

# Vágagentur á meistarakós

**Stórfavorittarnir úr Vágoynni høvdu lítlar og ongar trupulleikar av at basa uppflytarunum**

FLOGBÓLTUR, KVINNUR

Fossanes hev›i eitt sterkt mótstø›uli› á vitjan leygardagin, tá oddali›i› og FK-vinnarin Dráttur kom í KÍ-høllina.

Ta› var ongantí› ivi um vinnarali›i›, og Dráttur kundi leggja ein sigur afturum seg, í síni beinlei›is kós ímóti meistaraheitinum.

Men enn skulu tær tó ansa eftir Mjølni, sum ein ongantí› skal avskriva, sjálvt um Dráttur higartil hevur vunni› 2 av trimum dystum ímóti teimum í ár, um FK-kappingin ver›ur tikin vi›.

### Fossanes til Havnar

Fossanes skal komandi vikuskifti› leika ímóti Fleyr, og umbo›sfólk fyri Fossanes hava fyrr í ár sagt, at li›i› um stutta tí› fór at vinna sítt fyrsta sett, men um Fleyr gó›tekur, at ta› skal vera ímóti teimum er ivasamt, men alt kann henda.

Mjølnir-Fleyr 3-1 (25-18, 19-25, 25-23, 25-16)

# Klaksvíksingar framvegis á odda

**Hjá monnunum var talan um ein sera spennandi klassikara, sum tó enda›i vi› sigri til klaksvíkingar, sum framvegis eru á odda í bestu deildini**

FLOGBÓLTUR, MENN

Fleyr gjørdi seinasta vikuskifti› ta› bragdi› at vinna á Fram í Gundadalshøllini, so lagt var upp til ein spennandi dyst í KÍ-høllini leygardagin.

Mjølnir vann fyrsta setti› 25 - 18, men havnarmenninir vildu ikki yvirgeva seg, og klára›u at hála 2. setti› heim vi› settmuninum 25 - 19.

Og ta› sá eisini út til at Fleyr skuldi vinna tri›ja setti›, og vóru teir m.a. á odda 22-19, men so kom stígur í, og Mjølnir nærka›ist spakuliga, og fyrstu fer› at Mjølnir var frammanfyri, var vi› stø›una 24-23, og so var eingin vegur aftur og Mjølnir vann setti› 25-23.

### Trygvi í hopla

Fleyr hev›i stórar trupulleikar at stø›ga mi›álopunum hjá Trygva H. Poulsen, sum leikti í einum sonnum sigursrúsi, og vann næstan allar bóltar hann nært vi›. Og vi› Trygva H. Poulsen á odda, leg›i Mjølnir fyri í 4. setti. Fleyr fylgdi vi› í byrjanini, men ein fekk ta fatan, at hjarta› á Fleyr framvegis var í tri›ja setti, sum teir mistu á gólvi›, og li›i› kom ongantí› rættuliga fyri seg, og hesa stø›una tveitti Mjølnir ikki burtur.

### Borko at serva

Li›ini fylgdust umlei› helvtina av settinum, tó solei›is at klaksvíkingarnir alla tí›ina vóru frammanfyri. Men so fór Borko hjá Mjølni at serva, og hann fekk nógv stig, solei›is at setti› kundi fáast trygt í hús. Og sigurin gjørdis grei›ur vi› settmuninum 25-16. Samanumtiki› kann eisini sigast, at Fleyr ikki hev›i eydnuna vi› sær í servumóttøkuni, og royndi seg vi› fleiri leikarum, tó uttan at hetta eydna›ist til fulnar.

## Steinar Eirikstoft, Fleyr

– Eg hev›i vóna›, at vit fóru at vinna á Mjølni, og ta› sá eitt skifti› eisini út til at fara at eydnast, tá vit lógu á odda í endanum á tri›ja setti vi› umlei› 4 stigum, men so mistu vit alt á gólvi›. Samanumtiki› kann eisini sigast, at servurnar hjá okkum ikki vóru skarpar nokk, eins og eg hev›i trupulleikar vi› at blokka Trygva, men sigurin á Fram seinasta vikuskifti›, er tó toppurin á hesum kappingarárinum higartil.

Mjølnir-Fleyr 3-0 (25-18, 25-13, 15-13)

# Tryggur sigur

**Klassikarin hjá kvinnunum var als ikki so spennnandi, sum hann onkuntí› hevur veri›, men hetta var tó ikki anna› enn væntandi**

FLOGBÓLTUR, KVINNUR

Í nógv ár hava ta› veri› spennandi dystir millum Mjølnir og Fleyr, men í ár sær út til, at Mjølnir ikki n‡tist at leika upp til sítt besta fyri at vinna á Havnarli›num.

Ta› var ongantí› ivi um, hvat li› var ta› besta í Klaksvík leygardagin. Mjølnir leikti enn einafer› vi› sínum trygga spæli, uttan teir stórvegis persónligu feilirnar, sum millum anna› ey›kennir Fleyr í løtuni.

### Tina gó›an dyst

Tina Jacobsen hjá Mjølni gav Fleyr stórar trupulleikar vi› sínum gó›a mi›spæli, og ta› eydna›ist ongantí› Fleyr at blokera fyri hesum leiki.

Ta› tókist eisini, sum um leikararnir á Fleyrli›num høvdu trupulleikar vi› at standa á røttum plássi, tá Mjølnir var í álopi. T.d. vann Mjølnir nógv linjusmassj, uttan at Fleyr royndi at flyta verjuleikararnar.

Men samanumtiki› ein uppibor›in sigur til klaksvíkingarnar, sum komandi vikuskifti› skulu su›ur til Tvøroyrar.



Fram-ÍF 1-3 (25-22, 22-25, 23-25, 20-25)

# FRAM aftureftir og ÍF fram



*Eftir at teir eitt skifti lógu á odda í meistaradeildini, eru menninir hjá Fram nú fullkomuliga uppsteðgaðir*

**Meðan Fram tykist hava mist stevið, er støðan beint hin øvugta hjá ÍF, sum nú veruliga hevur fingið glið á**

FLOGBÓLTUR, MENN

Tað gongur ikki eftir vild hjá Havnarliðnum Fram fyri tíðina. Seinasta vikuskiftið taptu teir uppiborið ímóti Fleyr, og gongdin sunnudagin ímóti ÍF var ikki betri.

Fram vann fyrsta settið 25-22 og kom eisini best frá byrjan í 2. setti við at koma á odda 6-2, men ÍF við Boban og Bartali Elisasen á odda, komu tó skjótt upp á 7-8.

### Ágangur á Jens Hera

Skilliga sást, at taktikkurin hjá ÍF var at serva á Jens Hera Mortensen, fyri á henda hátt at fáa hildið hann uttanfyri leikin, og fyri at oyðileggja eitt av álopsvápnunum hjá Fram.

Og hetta eydnaðist væl hjá ÍF. Móttøkurnar hjá Jens Hera vóru kanska ikki so nógv nervaðar av hesum, men tað vísti seg, at hann frammi við netið ikki rættuliga fekk innstillað kanónina, sum hann hevur gjørt fyrr í vetur. Hann var tí ikki nøkur hóttan frammi við netið.

Restina av 2. setti fylgdist liðini upp á støðuna 18-18, men so kom ÍF framum og førdi eitt skifti 24-21, tá Fram tók Time-out – eitt time out, sum átti at verið tikið fyrr, um tað skuldi gjørt størri nyttu. Men ÍF vann settið 25-22.

### Sama gongd

Í triðja og fjórða setti var gondin tann sama sum í øðrum setti. Fram kom best frá byrjan, men so byrjaði ÍF at leika seg inn í dystin og drógv tað longsta stráðið til seinast.

Rúni Weihe, sum vanliga er ein av berandi leikarunum hjá Fram, hevði tað mangan trupult úti á kantinum, tí tað var javnan, at tað vóru tríggir blokkar frammanfyri honum.

Við tað at álopsspælið hjá Fram var heldur eintáttað – fá álop á miðjuni – valdi ÍF at seta tríggjar blokkar á positión 2, tá hevarin hjá Fram var frammi. Og hetta gav úrslit – serliga tá Kenneth Neshamar hjá ÍF var frammi við símum høga blokki. Hann vann nógva bóltar, eins og hann hevði sína ávirkan á, at verjuleikurin gjørdist lættari.

ÍF vann triðja settið 25-23 og fjórða settið 25-20, hóast at Fram eitt skifti var á odda 11-5. Men samanumtikið ein uppiborðin sigur hjá ÍF.

## Bartal Eliassen, ÍF

– Eftir sigurin hjá okkum á Fram í dag kann ein siga, at gongd er komin á hjá okkum, men um vit stevna beinleiðis ímóti meistaraheitinum, vil eg ikki siga. Í fyrsta umgangi fara vit at royna at vinna fyrru hálvu í landskappingini, og síðani mugu vit royna at síggja, hvat hetta røkkur til í seinasta enda. Men eitt FM-heiti hevði verið gott.

# Støðan

**Meistaradeild menn:**

| Lið | Dystir leiktir | vunnir | taptir | Sett vunnin | tapt | munur | * Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Mjølnir | 5 | 4 | 1 | 14 | 5 | 9 | 8 |
| ÍF | 4 | 3 | 1 | 10 | 5 | 5 | 6 |
| Fram | 5 | 3 | 2 | 11 | 9 | 2 | 6 |
| Fleyr | 5 | 2 | 3 | 8 | 11 | -3 | 4 |
| SÍ | 5 | 0 | 5 | 2 | 15 | -13 | 0 |

**Meistaradeild kvinnur:**

| Lið | Dystir leiktir | vunnir | taptir | Sett vunnin | tapt | munur | * Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dráttur | 6 | 5 | 1 | 17 | 5 | 12 | 10 |
| Mjølnir | 6 | 5 | 1 | 16 | 5 | 11 | 10 |
| ÍF | 6 | 3 | 3 | 10 | 11 | -1 | 6 |
| Fleyr | 6 | 3 | 3 | 10 | 12 | -2 | 6 |
| TB | 6 | 2 | 4 | 11 | 13 | -2 | 4 |
| Fossánes | 6 | 0 | 6 | 0 | 18 | -18 | 0 |


Umhvørvisleiðsla ISO 14001

DET NORSKE VERITAS skipar, í samstarvi við Atlanticon og Norðcon, fyri kunnandi fundi um umhvørvisleiðslu eftir ISO 14001 skipanini **hósdagin 23. november kl. 19.00 á Hotel Føroyum.**

Søren Hald frá Det Norske Veritas í Aalborg fer at greiða frá um umhvørvisleiðslu eftir ISO14001. Eisini verður stutt greitt frá Góðskuleiðslu eftir ISO9001 og Arbeiðsumhvørvi & Trygd eftir ISO 18001. Høvi verður at seta spurningar.

Aftaná fundin er møguleiki at fáa eitt prát við okkum.

Øll áhugaði eru vælkomin.

**DET NORSKE VERITAS**
**Vestara Bryggja, 100 Tórshavn**
**Tel. 313750, fax. 317588,**
**E-mail: torshavn@dnv.com**

Sosialurin - 311820